# Sørvágs Kommuna

# Kunningarskriv
# 2010







www.sorvag.fo

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Kunningarskriv 2010**

**Góðu borgarar**

Sum nevnt í kunningarskrivinum í fjør, so hevur tað verið siðvenja her í kommununi, at borgarar okkara við árslok fáa eitt kunningarskriv, har greitt verður frá, hvussu skorist hevur í brátt farna ári, og hvørjar ætlanir bygdaráðið hevur í árinum, sum kemur.

Tosað hevur oftað verið í bygdaráðnum, um tíðin ikki er farin frá slíkum tíðindaskrivum, tí vit dagliga verða yvirfóðraði við tíðindum um alt millum himmal og jørð, men fyribils eru vit komin til ta niðurstøðu, at rætt er at kunna borgaran í okkara lítla nærumhvørvi, áðrenn sjøtul verður settur á nýggja árið. Hetta bæði fyri at halda í nakkan á okkum sjálvum, og fyri at kunna borgaran, hvat hann kann rokna við at fáa fyri kommunuskattakrónurnar.

**Fíggjarætlanin 2010**
Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2010 var ætlanin at gera íløgur fyri 9.9 mió.kr. í 2010.

Høvuðsíløgurnar vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Musikkskúlin | 3.188.000 |
| Svimjihøllin | 1.000.000 |
| Fríðkan í kommununi | 1.169.000 |
| Byggibúning | 2.640.000 |
| Vatnveiting | 500.000 |
| Havnir og lendingar | 700.000 |

**Hvat er framt í verki**
Leygardagin 13. november 2010 var søguligur dagur í Sørvági. Musikkskúlin varð tikin í brúk, og nógv fólk var samankomið at hoyra talur og tónleik. Tey flestu eru samd um, at Gamli skúli, sum bygningurin nú eitur, fellur væl inn í umhvørvið á staðnum, og samspælið millum gamalt og nýtt er hepnast til fulnar.



Bygdaráðið vónar at tey,sum brúka bygningin, fara væl um hann, og at hann verður til gleði og gagn fyri okkara borgarar. Gamli skúli hevur, um ikki fostrað, so hýst mongum kendum tónleikarum, og við teimum góðu umstøðunum, sum nú eru, vóna vit, at tann dagur ikki er langt burtur, at okkurt klípi verður lagt aftrat tí varða, sum millum manna verður nevnt Vágasoundið.

**Svimjihøllin**

Tekjan á svimjihøllini hevur í fleiri ár verið í vánaligum standi og tí ringa samvitskan hjá bygdaráðslimum,tí bert hugflogið kann seta mark fyri, hvat kundi hent, um illa vildi tili, meðan fólk var í hylinum.. Í summar varð arbeiðið boðið út, og Trøðhamar fekk arbeiðið. Umframt tekjuna vórðu el-leiðingarnir í bygninginum skiftar út. Tað er kanska vert at geva gætur, at bygningurin er frá 1974, so tey, sum hava bygt bygningin og verið um hann øll hesi ár, hava gjørt sítt arbeiði til lítar, tí ikki sæst við at hyggja inn í bygningin, at hann hevur 36 ár á baki.



**Mykines**

Mykines er í teirri serstøðu, at hon er útoyggj. Útoyggjar kunnu fáa stuðul til ymisk átøk, sum verða fíggjað av konto á fíggjarlógini, sum eitur stuðul til infrakervið á útoyggj. Í ár eru trappurnar oman til lendingina asfalteraðar og umvaldar, og tá rimaverk úr jarni varð gjørt fram við trappunum í fjør, so eru møguleikarnir hjá fólki at koma oman og niðan frá lendingini bøttir munandi.



Fjørdalsgøta, sum er gøtan frá neystunum niðan á Berg, er steinsett upp ímóti bakkanum, og ætlanin er at asfaltera hana fyrst í komandi ári. Ætlanin er eisini at gera eitt alment vesi norðan fyri lærarahúsini, og loyvi frá eigarum og náttúrufriðingarmynduleikum er fingið til vega. Vit hava aftur í ár sent Innlendismálaráðnum umsókn um stuðul til ymiskar ábøtur í oynni.

**Fríðkan í kommununi**

Síðstu nógvu árini er bróðurparturin av hesi játtan farin til grótlaðing á Niðaravegi. Nú eru vit loksins komnir heim á vegamótið millum Ovara- og Niðaraveg og laðaðir eru slakir 600 metrar.Nakað av peningi varð m.a.eisini brúktur til at fríðka um í havanum hjá Ellu..




Vert er at nevna, at bygdaráðið í nøkur ár av hesi játtan hevur fíggjað m.a. trøini, sum kommunan hevur latið borgarum sínum ókeypis. Bíggjarbati hevur eisini søkt og fingið av hesari játtan. Teirra arbeiði hevur verið fyrimyndarligt. Vit kunnu kalla tað hjálp til sjálvhjálp. Tey hava sjálvi fostrað hugskotini og lagt arbeiðið til rættis, sjálvi gjørt arbeiðið ókeypis, og tá fáa vit, umframt meira fyri peningin, eisini samanhald og kenslu av, at vit eru ein partur av tí, ið hendir í okkara nærumhvørvi.Tað eru økir í kommununi, sum kundu verið skipaði eftir sama leisti.

**Byggibúning**

Størsti parturin av byggibúningini fór til jarðarkeyp. Kommunan eigur nú alt, sum er hegnað inni uppi á Ídnaðarøkinum uppi á Hálsi og lendið úti í Billubønum.Restin av játtanini er farin til vegagerð í Hagagerði og í Billubønum. Tað vegastrekkið, sum er farið við størstu játtanini, er Ovarivegur og vegurin út í Geilina. Nýggjur vatnleiðingur, sum liggur í vegnum er trýstroyndur og kloakkirnar eru savnaðar saman og førdar heim í gilið við bussskýlið. Alt strekkið er asfalterað. Eisini varð Dávabreyt í miðbygdini í Bø og vegurin uppi á Reyni í Sørvági asfalteraður. Tá talan er um asfalt, er ynskilistin líka langur, sum ynskilistin hjá børnum til jóla, men hetta var so asfaltsraðfestingin í ár.

Sørvágs Kommuna
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Vatnveiting, havnir og lendingar**

Ætlanin var at fáa reinsiverkið í Bø tilsett í hesum árinum, men tað dróg út við loyvum frá mynduleikunum, so hetta arbeiði eiga vit á. Húsið, við reinsverkinum í, er komið til landið, og fyrst í komandi ári verður farið undir at gera fundamentið, sum húsið skal standa á.. Er vatngóðskan í lagi, er ætlanin at seta sama slag reinsiverk upp í Gásadali.



Bátahylurin hevur fingið ábøtur í farna ári. Umframt at uttari armurin er hampaður, er dráttur gjørdur og økið er asfalterað. Nakrir armar er skiftir út og Múlafýrurin er aftur komin til sín rætt og lýsir fyri innsiglingini.

**Vinnulívið**

Tá fiskaríið gongur væl, so ávirkar tað skjótt virksemið á landi. Serliga væl leggja vit merki til tað á bryggjuni, har eftirspurningurin eftir vørum og tænastum avspeglast av prísi og nøgd. Síðani gýtingina í vár hevur fiskaríið eftir upsa verið stak vánaligt. Bátar hava ligið, tí tað hevur ikki loyst seg at fiska.

Sum um tað ikki er nóg mikið, so er Fiskavirking farið av knóranum, og tað svitast næstan ikki, at minni eftirspurningur eftir einari vøru plagar at geva minni prís.

Vit mugu vóna, at okkurt skilagott reisist úr øskuni eftir Fiskavirking, og at framleiðslan á landi verður skipað soleiðis, at tað fer at bera til at fáast við fiskivinnu.. Annað alternativ til høvuðsvinnuna finst ikki í løtuni, hóast laksavinnan hevur gingið fram við risafetum, har ikki nøgdin, men prísurin hava verið viðvirkandi til góða avkastið.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

Nøgdirnar av føroyagrunninum, ið farnar eru um bryggjukantin hjá Sørvágs havn, eru vaksandi. Landingrmiðstøðin tók ímóti 3800 tonsum í 2007, 5000 tonsum í 2008, 7000 tonsum í 2009, og í skrivandi løtu eru 9000 tons farin um bryggjukantin í 2010. Í november mánaða tók landingarmiðstøðin ímóti 540 tonsum, og er hetta størsta nøgd, sum farin er gjøgnum miðstøðina ein mánaða.

**Ikki smá tøl**

Hugsa vit um nøgdirnar av fiski, ið farnar eru oman og niðan gjøgnum bygdina um Blindtarmin í hesum árinum, so eru tað ikki smá tøl. Landingarmiðstøðin hevur flutt 9000 tons, og Luna 5000 tons niðan ígjøgnum bygdina. Luna hevur eisini flutt 2100 tons oman ígjøgnum bygdina, sum eru komin av Gøtuvík til kryvjingar. So hevði Blindtarmurin dugað at talt, so hevði hann sæð 16000 tons farið framvið, at tað svarar til 16% av miðal botnfiskaveiðuni undir Føroyum árliga.

**Luna**

Sólskinssøgur eru fáar í hesum døgum, men alivinnan hoyrir til undantakið og hevur havt vind í seglunum í brátt farna ári. Kryvjivirkið Luna metti við árslok í fjør, at kruvd fóru at verða góð 5000 tons í 2010. Virkið hevur í ár tikið 5100 tons. Av hesum vóru 3000 tons tikin á Sørvágsfirði, meðan 2100 tons eru tikin á Gøtuvík. Meðan steðgur er í tøkuni, eru handverkarar farnir at hampa um bygningin uttan. Hann verður klæddur við timbri.

Tey á virkinum vænta at kryvja 8000 tons næsta ár. Fyrra hálvárið verður tikið av Gøtuvík, so verður farið til Miðvágs.

Í 2010 hevur ofta verið trongligt á bryggjuni. Um ólavssøkuleitið varð tøkubúrið,sum aliringarnir hava verið festir í áðrenn laksurin varð pumpaður beinleiðis inn á virkið, sleipað til Gøtu. Eftir ætlan verður tøkubúrið flutt úr Miðvági til Sørvágs fyrst í nýggja árinum 2012.

**Samanumtikið**

Skulu vit taka saman um fyri árið 2010, hvat inntøkum viðvíkir, so hevur A-inntøkan verið eitt vet størri, enn mett var, tá fíggjarætlanin varð gjørd. Sammeta vit fyrstu 11 mánaðirnar í 2009 og 2010, so var inntøkan 26.839.523 kr. í 2009 móti 28.029.074 kr. í 2010. Hetta er ein vøkstur upp á 1.189.551 kr.,sum í prosentum svarar til 4,43.

Okkara borgarar hava tó ikki havt inntøkuvøkstur, sum svarar til 4,43 prosent, tí bygdaráðið samtykti fyri árslok 2009, at skattaprosentið skuldi hækka frá 20,5 til

21. Umroknað við gamla kommunuskattaprosentinum hevði økingin sjálvandi verið minni.

Hvat partafelagsskatti viðvíkir, so verður hann 450.000 kr. sammett við 900.000 kr. í 2009 og 1,7 mió.kr. í 2008. Almennar fyritøkur, sum bera bróðurpartin av partafelagsskattinum, kastaðu minni av sær aftur í ár, so hetta avspeglar afturgongdina, sum verið hevur í samfelagnum.

Nú er tað vanligt, at skattainntøkan hjá kommununum verður kunngjørd í fjølmiðlunum fyrst í hvørjum mánaða. So verður sagt, hvussu inntøkan í krónum og prosentum er í mun til árið fyri.
Hesi tølini eru ikki heilt røtt, tí tað, sum kommunurnar fáa inn fyrst í hvørjum mánaða, er fyribilsskattur. Endaligi skatturin verður ikki avroknaður fyrr enn um heystið árið eftir, og tá kunnu reguleringarnar hjá okkum verða nakrar 100.000 kr. báðar vegir.

**Fíggjarætlanin 2011**

Fyri at fíggja rakstur og íløgur hevur kommunan eina fíggjarætlan, sum verður samtykt fyri 1. november á hvørjum ári. Bygdaráðið samtykti við 2. viðgerð fíggjarætlanina fyri 2011 á regluligum fundi 24. november 2011.

Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru:

| | |
|---|---|
| Samlaðar rakstrarútreiðslur: | 26.094.000 |
| Samlaðar inntøkur: | 29.700.000 |
| Yvirskot eftir rakstur: | 3.606.000 |
| Avdráttur: | 617.000 |
| Yvirskot eftir avdrátt: | 2.989.000 |
| Samlaðar íløgur: | 8.590.000 |
| Fíggjarætlanin javnvigar við: | 35.300.000 |
| Rakstrarútreiðslur + íløgur = | 35.300.000 |
| Inntøku + lántøka = | 35.300.000 |

Fyri at fíggja ætlaðu útreiðslurnar er neyðugt at lána 5,6 mió.kr. Barnafrádrátturin verður óbroyttur 4000 kr. fyri hvørt barnið, og skattaprosentið verður óbroytt 21,0 fyri skattaárið 2011. Sum áður nevnt átaka vit okkum skuld, tí útbyggingar verða raðfestar hægri enn raksturin loyvir. Okkara skattaprosent liggur undir tí, sum flestu miðalstóru kommunur hava, og væl lægri enn tað, sum okkara nærmastu grannar hava.

**Fíggjarstøðan**

Við árslok er langfreistaða nettoskuldin hjá kommununi 8,5 mió.kr. Avdráttur av hesum lánum verður goldin í komandi ári. Vit hava fingið tilsøgn um at lána 5,6 mió.kr. frá peningastovni til lutvísa fígging av íløgunum í komandi ári, og hendir einki óvæntað, so verður nettoskuldin við árslok komandi ár góðar 13 mió.kr.

Áhaldandi tosið um at leggja kommunur saman við lóg hevur gjørt meira skaða enn gagn. Eftir at kommunurnar høvdu verið skuldarbundnar upp um skorsteinarnar frá 90-unum, var kommunuskuldin eftir aldarskiftið komin niður á eitt hóskandi støði.

Nú byrjaðu flestu kommunur at gera íløgur, so tær komu upp undir skuldarmarkið, sum er kommunuskatturin av einari skattaálíkning. Umframt hetta eru myndugleikarnir byrjaðir at tosa um samstarv á skúlaøkinum. Alt eftir hvar í valskeiðnum hjá løtinginum, vit eru, kanst tú gera metingar, um samanlegging verður gjørd við lóg. Nú er bert eitt ár til løgtingsval skal verða, so nú verður einki gjørt, tí var tað torført at steingja nøkur posthús, so verður tað ikki minni trupult at steingja bygdaskúlar, sum uppskotið um skúlasamstarv leggur upp til.

**Íløguætlan í 2011**

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2011 er ætlanin at gera íløgur fyri 8.590.000 kr. Høvuðsíløgurnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Skúlin | 4.080.000 |
| Sandurin | 1.124.125 |
| Alvalon | 400.000 |
| Ítróttaranlegg | 100.000 |
| Lønarskipan | 102.000 |
| Keyp av lendi | 278.502 |
| Fríðkan og grótlaðing | 1.000.000 |
| Byggibúning | 855.373 |
| Vatn Gásadalur | 300.000 |
| Vegir og amboð | 750.000 |
| Havnin | 200.000 |
| Ídnaðarøkið | -600.00 |

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Skúlin**
Tann eldri parturin av Nýggja skúla er hálvt hundrað ára gamal, og sjálvt um skiftandi bygdaráð ígjøgnum tíðirnar eftir førimuni hava havt umsorgan fyri skúlanum og roynt at hildið hann við líka, so er neyðugt at fara undir eina skipaða tilgongd, har ábøtur verða gjørdar tey komandi árini. Vit kunnu heilt einfalt ikki lata standa til.

Verkfrøðingastovan hevur gjørt eina meting av Sørvágs skúla við atliti til, um soppatrupulleikar kunnu væntast at vera í bygninginum eins í líknandi bygningum bygdir um somu tíð. Hetta arbeiði varð gjørt eftir ynski frá skúlastýrinum í kommununi.

Í staðin fyri at fara undir eina bygningskanning við holboringum, holskeringum og laboratoriukanningum mæla teir til at fara undir eina skipaða umvæling eftir einari heildarætlan.Umvælingin er í stuttum:

Nýggja tekju og bjálving
Gamla fimleikahøllin nýggja tekju og bjálving
Bjálva og vætutryggja móti lendi.

Størsti parturin av íløguni fer sostatt til at bjálva og skifta tekjurnar á gomlu bygningunum, meðan bjálving og vætutrygging snýr seg um at grava niður um bygningin niðan móti parkeringsplássinum á Skúlavegnum. Næsta stigið á leiðini er m.a.at bjálva útsíðuna á gomlu bygningunum.

**Sandurin**
Sørvágs Kommuna hevur í samtarvi við Jarðfeingi arbeitt við einari verkætlan, har ætlanin er at fáa sjóhitan úr sandinum til upphiting av Sørvágs Skúla. Hugskotið hevur vakt ans, og Innlendismálaráðið hevur játtað at verða við í fíggingini við ávísum treytum. Almenni stuðulin verður 635.000 kr., meðan kommunan fíggjar restina.

Hugskotið er at leggja 5 km. av jørðslangu ein metur niður í sandin. Henda slangulongdin skal so kunna upptaka ta orku, sum skal kunna nøkta orkutørvin á skúlanum og svimjihøllini. Skipanin er roynd aðrastaðni, men ikki í Føroyum.

Tvær føroyskar fyritøkur hava verið inni í myndini, tá talan er um tilfar sum hitapumpur v.m. í samband við verætlanina. Fyritøkan Reno-Vent Sp/f hevur fingið uppgávuna at gera tær seinastu kanningarnar, áðrenn endalig støða kann takast.

Tað er givið, at vit vilja tryggja bæði okkara og almenna peningin so væl sum gjørligt, áðrenn farið verður undir arbeiðið.

Sørvágs Kommuna
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

**Alvalon**
Í høvuðsyvirlitinum yvir íløgurnar eru upphæddir settar av til Alvalon, ítróttaranlegg,lønarskipan og keyp av lendi. Í Alvalon er ætlanin at gera loftið meira alment tilgongiligt. Fyri at fáa betri samband millum loft og miðhædd, verður nýggj trappa gjørd í felagsrúminum, og í erva verða loftini bundin saman við balkongbrúgv. sPF Westtec hevur gjørt eitt uppskot um, hvussu fleiri valmøguleikar kunnu gerast uttan tær stóru broytingarnar í bygninginum.



**Fríðkan og grótlaðing**

Garðurin á Niðaraveg er, sum áður nevnt, komin heim á vegamótið millum Ovara-og Niðaraveg. Frá Eik fram við húsunum út um Kedron er ætlanin at gera gongubreyt, so fótgangarar og bilar verða skiltir at á hesum vegastrekki. So er ætlanin at gera trappurnar úti við bussskýlið.

**Fundir v.m.**
Bygdaráðið hevur havt 13 bygdaráðsfundir í 2010. Íalt 141 mál hava verið til viðgerðar.
Bygdaráðið hevur ásett føstau bygdaráðsfundirnar fyri 2011. Fundirnir verða kl.18 í fundarhølinum á kommunaskrivstovuni niðanfyrinevndu dagar:

| | |
|---|---|
| Mikukvøldið | 28. januar 2011 |
| Mikukvøldið | 23. februar 2011 |
| Hóskvøldið | 31. mars 2011 |
| Mikukvøldið | 27. apríl 2011 |
| Mikukvøldið | 25. mai 2011 |
| Mikukvøldið | 29. juni 2011 |
| Mikukvøldið | 07. september 2011 |
| Mikukvøldið | 28. september 2011 |
| Mikukvøldið | 26. oktober 2011 |
| Mikukvøldið | 09. november 2011 |
| Mikukvøldið | 23. november 2011 |
| Mikukvøldið | 07. Desember 2011 |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu, verða lýstir í svørtutalvu á kommunuskrivstovuni.

**Fólkatalið**
Tá ið bygdirnar í vestara parti av oynni og Mykines løgdu saman í 2004, var fólkatalið íalt 1084 fólk. Við árslok 2008 var fólkatalið 1137 fólk, meðan fólkatalið í bygdunum í dag sær soleiðis út í mun til somu tíð í fjør:

| | **2009** | **2010** |
|---|---|---|
| Sørvágur | 1027 | 1023 |
| Bøur | 74 | 76 |
| Gásadalur | 23 | 21 |
| Mykines | 16 | 16 |
| | - ----- | ------ |
| | **1140** | **1136** |

Hyggja vit í yvirlitið yvir jarðarferðir í bókini hjá Petur Kruse Sørvágs kirkja, so síggja vit, at miðaltalið fyri andlátum er um 10 fólk árliga frá 1986, har bókin endar og fleiri ár aftur.

Í ár hava í skrivandi løtu verið 22 andlát. Tey gomlu skulu doyggja, tey ungu kunnu doyggja, verður sagt. Fleiri av teimum, sum farin eru, eru fólk í bestu árum, og tí kennist sorgin og saknurin so stórur í okkara lítla nærumhvørvi, har vit koma hvørjum øðrum meira við. At veita styrki og vón kann bert tann eini gera.

**Sørvágs Kommuna**
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur
tlf. +298 363200 • fax +298 363201 • www.sorvag.fo

## At enda

Hetta var so ein lítil samandráttur av tí, sum gjørt er, og hvat ætlanin er at gera í komandi ári. Og við hesum fari eg vegna bygdaráðið og umsitingina at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk fyri tað brátt farna.

Sørvági, 18. desember 2010

Vinaliga

Sørvágs Kommuna

Sune Jacobsen



**Sørvágs Kommuna**

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363206 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo www.sorvag.fo

| | **Høvuðsyvirlit yvir roknskapin fyri 2009** | | | **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan fyri 2011** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Túsund kr.** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **3.493** | **-** | **0** | **3.108** | **-** | **102** |
| 11. Felagsútreiðslur | 3.493 | - | - | 3.108 | - | 102 |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **2.786** | **-** | **-** | **2.804** | **-** | **-** |
| 20. Heilsumál | 986 | - | - | 1.182 | - | - |
| 21. Almannamál | 1.800 | - | - | 1.622 | - | - |
| **§ 3. Børn og ung** | **6.050** | **-** | **45** | **6.343** | **-** | **81** |
| 26. Barnaansing | 6.050 | - | 45 | 6.343 | - | 81 |
| **§ 4. Undirvísing** | **3.389** | **-** | **359** | **3.554** | **-** | **5.204** |
| 23. Útbúgving og gransking | 3.389 | - | 359 | 3.554 | - | 5.204 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **2.173** | **-** | **1.120** | **1.736** | **-** | **100** |
| 23. Útbúgving og gransking | 401 | - | 1.120 | 385 | - | - |
| 24. Mentan | 1.772 | - | - | 1.351 | - | 100 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **3.336** | **-** | **5.008** | **4.096** | **-** | **2.902** |
| 11. Felagsútreiðslur | 553 | - | 1.538 | 565 | - | 1.319 |
| 22. Íbúðarmál | - | - | 1.166 | - | - | 1.134 |
| 24. Mentan | 119 | - | - | 99 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 743 | - | 180 | 930 | - | 300 |
| 37. Handil og vinna annars | - | - | 709 | - | - | -600 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 1.922 | - | 1.415 | 2.503 | - | 750 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **2.601** | **-** | **354** | **2.553** | **-** | **200** |
| 30. Umhvørvi | 1.939 | - | - | 1.986 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 418 | - | - | 371 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | 244 | - | 354 | 195 | - | 200 |
| **Tilsamans** | **23.827** | **-** | **6.887** | **24.194** | **-** | **8.590** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 1.086 | - | - | 1.000 | - | - |
| § 20. 35. Sjóvinna | 32 | - | - | - | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 587 | 344 | - | 900 | 280 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | | 30.725 | | - | 29.420 | - |
| **Tilsamans** | **25.532** | **31.069** | **6.887** | **26.094** | **29.700** | **8.590** |
| Yvirskot | | 5.537 | | | 3.606 | |